# Íslendskir smádreingir av Hornafirði vitja HB

Í hesum døgum hevur HB vitjan av einum smádreingjaliði hjá íslendska felagnum Sindri av Hornafirði. Hornafjørður liggur á Suðureysturlandinum knappar 500 km frá Reykjavík.

Íslendsku smádreingirnir komu til Føroya við Norrønu fríggjamorgunin og gista í HB-húsinum. Fríggjadagin seinnapart spældu teir ímóti B36, og kanska vóru jau'arnir eitt sindur ferðatroyttir, tí B36-smádreingirnir vunnu heili 11-1. Ferðatroyttir íslendingar ella ei - tað skal kortini einki takast frá B36'arunum.

Leygardagin tóku íslendingarnir sær av løttum. Vitjaðu í svimjihøllini og hugdu nærri upp á høvuðsstaðin - sum teir halda vera sera hugnaligan.

Sunnudagin hitaðu íslendingarnir saman við HBa upp til 1. deildargrannauppgerðina í Havn. Eisini her fingu teir vælvaksnu íslendingarnir harða mótstøðu og máttu taka við einum tapi uppá 6-0.

Sindri Hornafjørður hevur 2 dystir eftir at leika. Mánakvøldið skulu teir royna seg móti Argja-dreingum úti á Argjum, og týsdagin skulu teir til Runavíkar at royna seg ímóti fótfimu NSÍ'arunum.

Vitjanin hjá Sindri Hornafjørður endar mikudagin, tá teir 18 íslendsku smádreingirnir og 5 leiðararnir fara heim aftur við Norrønu.



*Tað mundi vera lítil troyst hjá B68, at Øssur Hansen móti dystarenda minkaði til 1-3. Toftamenn eru framvegis niðastir á talvuni, og enn er einkii stig fingið til høldar*

B68-VB 1-3 (0-2):

# Tað gongur strúkandi hjá VB

**Eftir heimatapið ímóti vágbingum er B68 fyri fyrstu ferð uttan stig, tá ið fyrsti triðingurin av kappingini er runnin**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað gongur strúkandi hjá VB, og tað gongur illa hjá B68. Úrslitið á Svangaskarði var tí á aldukambinum til vildar, meðan teir í B68 eftir 3-1 tapið mugu staðfesta, at teir framvegis eiga á at vinna fyrsta stigið. Fyri fyrstu ferð øll árini, síðani toftaliðið í 1981 kom í bestu deildina, hava teir spælt fyrsta triðingin av kappingini, uttan at tað hevur eydnast teimum at fáa eitt tað einasta stig.

Trygvi Mortensen hevði gjørt onkrar manningarligar justeringar. Í útgangsstøðuni var B68 í 4-3-3 uppstilling, sum seinni varð broytt til 4-4-2. Mortan Hansen, sum hevur verið málverji, síðani Albert Sævarsson fór aftur til Íslands, var á beinkinum hesa ferð. Miðskeiðis í 2. hálvleiki varð hann settur inn í álopið. Millum stólparnar hesa ferð var Jazek Przybylski. Stóran part av kappingarárinum í fjør var hann málverji hjá GÍ, og higartil í ár hevur hann verið málverji á næstbesta B68 liðnum.

Vágbingar eru seinastu vikurnar farnir frá sigri til sigurs, og tað styrkir sjálvandi um sjálvsálitið. Hesa ferð vóru teir í umleið somu uppstilling, sum teir hava verið nógvu tær seinastu ferðirnar. Teir kenna sínar leiklutir, og teir vita, hvat tað snýr seg um. VB er væl fyri. B68 hevði rætta hugburðin, og teir stríddust tað, sum teir vóru mentir. Men gestirnir vóru støðugt eitt vet omaná. Vágbingarnir vóru skjótari, teir arbeiddu nógv, teir vóru fyri tað mesta stinnari í nærdystunum, og teir vóru fyrstir á returbóltunum.

Munurin var ikki rættuliga stórur, og málmøguleikarnir vóru ikki so nógvir. Bjarni Johansen í VB málinum hevði ikki nógv at gera, og pólverski starvsfelagin hjá honum í hinum endanum hevði fáar møguleikar at vísa, at tað er hann, sum skal vera aftasti skansin, nú B68 hevur tólv umfør eftir at koma á stigatalvuna og klatra brøttu brekkuna av tíggjunda og fram á næstaftasta plássið.

## Málini

Við nýggjum venjara og í roynd at vaska talvuna reina ráddi tað um hjá heimaliðnum fyrst og fremst at halda tætt í verjupartinum, áðrenn tað kundi hugsast alt ov nógv um framrættaða partin. Tí var tað køld pøs av vatnið í andlitið á B68, tá ið VB longu í fimta minutti gav fyrstu ábendingina um, hvønn veg stigini skuldu fara. Birgir Jørgensen royndi seg úti frá, skotinum bilti einki, og nýggi B68 málverjin tóktist ikki hava stórvegis møguleikar at bjarga.

Í 26. minutti varð 2-0 til VB. Hesa ferð var tað miðvallarin í høgru, Palli Augustinussen, sum átti síðsta fótin á. Uppspælið í vinstra borði var gott, innlegginum bilti einki, og Palli var leysur, tá ið hann skoraði til 2-0.

Tá ið tað restaði eitt korter kundi tað sæð út sum um, at B68 fekk møguleikan at fáa um endan. Mindaugas sá gula kortið fyri aðru ferð. Harvið noyddist hann av víkja av válinum, og so skuldi VB síðsta korterið stríðast við tíggju og ímóti ellivu. Men tað tóktist ikki at bila. Bara tveir minuttir eftir, at ein av teirra varð rikin av vøllinum, skoraði VB til 3-0, og harvið var uppgerðin afturlatin, sum tað nú á døgum verður nevnt. Álitisfulli og støðugi miðvallarin, Milan Kuljic, var málskjútti í hesum førinum. B68 misti í uppspæli, spælt varð fram í høgru, og úr eitt sindur spískum og uttanvert brotsteigin smekkaði Milan til. Skotið var sera gott, og bólturin smoygdi sær inn í handara síðunetið.

Øssur Hansen pyntaði um tveir minuttir seinni. Royndasti B68 maðurin krúllaði framvið tveimum, áðrenn hann royndi ímóti málinum, og bólturin fór í málið dygst inn við stólpanum. Harvið var fyrsta málið veruleiki, síðani nýggjur maður tók um stýrisvølin. Kanska tað gav lítla vón um, at tað skal bera til, tá ið B68 mánakvøldið í næstu viku skal inn til Fuglafirðar at verða annar parturin av oyggjauppgerðini, sum tað nú er lagt upp til skal gerast rættuligt lagnustríð. Bæði hjá ÍF og B68.

## FAKTA UM DYSTIN

**B68-VB 1-3 (0-2)**
0-1: Birgir Jørgensen 5.
0-2: Palli Augustinussen 26.
0-3: Milan Kuljic 77.
1-3: Øssur Hansen 79.
**Dómari:** Georg Rasmussen
**B68:** Jazek Przybylski – Kári Sigvardsen, Oleif Joensen, Herbert í Lon Jacobsen, Jákup Eli Olsen – Mikkjal Thomassen (Bogi Petersen, 61.), Øssur Hansen, Eyðstein Skipanes – Óli Olsen (Mortan Hansen, 71.) Stanislav Stankhov (Jóhan Petur Poulsen, 26.), Øssur Jacobsen
**Gult kort:** Herbert í Lon Jacobsen, Mikkjal Thomassen, Jákup Eli Olsen
**VB:** Bjarni Johansen – Jákup F. Olsen, Mikael í Lágabø, Eyðun Jacobsen, Mortan úr Hørg – Palli Augustinussen (Kári í Lágabø, 86.), Milan Kuljic (John Poulsen, 88.), Dan Djurhuus, Jón Pauli Olsen – Birgir Jørgensen, Mindaugas
**Gult kort:** Dan Djurhuus
**Reytt kort:** Mindaugas 75 (tvey gul)



# Andrew skaddur

**Andrew av Fløtum var ikki við, tá Fremad Amager – hóast tap – tryggjaði sær tilveruna í 1. deild. Eisini Vejle tykist nú vera ávegis bjargingini, og í oddinum heldur Horsens framvegis fast um sín møguleika**

DANSKA 1. DEILD
*Jákup Mørk*

Tríggir av teimum fimm føroysku leikarunum í næstbestu donsku deildini, vóru í dysti um vikuskifti.

Teir báðir, sum ikki vóru til arbeiðis hesaferð vóru báðir álopsmenninir hjá landsliðnum. Christian Høgni Jacobsen hevur tó ikki gjørt um seg seinastu longu tíðina, og áðrenn hann kann fara at hugsa um fótbóltin aftur, skal hann fáa bilbugt við krossbandsskaðan, sum var so óheppin av fáa.

Hjá Andrew av Fløtum hevur støðan tó verið nakað øðrvísi. Seinastu umførini hevur hann meira ella minni verið álitið í álopinum hjá Fremad Amager. Tí var tað eisini dyggur smeitur, at Andrew hevði tikið seg aftur við einum eymum lærvødda, og hartil var talan eisini um fleiri aðrar broytingar hjá Fremad Amager, tá teir á útivølli skuldu royna seg móti Køge, sum verður roknað millum sterkastu liðini í deildini.

Jann Ingi Petersen og Hjalgrím Elttør vóru báðir á liðnum allar 90 minuttirnar, men hjálpti tó lítið, tí Køge vann dystin 2-0. Fyrra av málunum varð skotið av Abdul Sule, sum fyri nøkrum árum síðani gjørdist dýrasti leikarin í donskum fótbóltshandli, tá AB keypti hann leysan av FC Midtjylland.

Hóast tapið, so hevur Fremad Amager nú tryggjað sær sætið í næstbestu donsku deildini til komandi ár. Hetta tí øll liðini undir tiemum ikki fingu fulla úrtøku, og tí kunnu tey í felagnum nú betri gera av, hvussu ætlanirnar skulu verða fyri komandi kappingarárið.

## Horsens roynir

Við sigrinum á Silkeborg seinasta vikuskiftið, fekk Horsen – har Johan Byrial Hansen er ein av leikarunum – aftur blást lív í vónirnar um uppflyting, og hesar liva eisini framvegis.

Mótstøðuliðið hesaferð var Skjold, og á útivølli eydnaðist Byrial & Co. at toga ein tepran 1-0 sigur heim. Argastu kappingarneytarnir í uppflytingarstríðnum eru Randers, og teir vunnu á heimavølli 3-0 móti Nykøbing, og hildu teir sær soleiðis eitt stig oman fyri Horsens. Til stuttleikar kann nevnast, at venjarar hjá teimum báðum uppflytingarbiðlunum eru gomlu makkararnir í EM-verjuni hjá Danmark. Nevnliga Lars Olsen og Kent Nielsen.

Og endaliga kann so eisini staðfestast, at liðfelagarnir hja skadda Christiani Høgna Jacobsen tykjast vera í ferð við at gera eina bjargingarroynd í evstu løtu.

Tað hevur annars einki borið til hjá Vejle í langa tíð, men sunnudagin vunnu teir ikki minni enn 7-1 á vespunum úr Brønshøj, og lyftu teir sær soleiðis upp um niðurflytingarstrikuna.

## Danska 1. deild

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Silkeborg | 28 | 20 | - | 4 | - | 4 | 65 | 22 | 43 | 64 |
| 2 Randers FC | 28 | 19 | - | 3 | - | 6 | 78 | 39 | 39 | 60 |
| 3 AC Horsens | 28 | 18 | - | 5 | - | 5 | 47 | 22 | 25 | 59 |
| 4 Køge | 28 | 16 | - | 7 | - | 5 | 54 | 36 | 18 | 55 |
| 5 Sønderjyske E | 28 | 15 | - | 6 | - | 7 | 69 | 44 | 25 | 51 |
| 6 Skjold | 28 | 14 | - | 4 | - | 10 | 56 | 46 | 10 | 46 |
| 7 Ølstykke | 28 | 13 | - | 3 | - | 12 | 57 | 50 | 7 | 42 |
| 8 Nykøbing | 28 | 12 | - | 4 | - | 12 | 42 | 46 | -4 | 40 |
| 9 FC Nordjylland | 28 | 10 | - | 8 | - | 10 | 33 | 40 | -7 | 38 |
| 10 Fredericia | 28 | 8 | - | 9 | - | 11 | 38 | 41 | -3 | 33 |
| 11 Fremad Amager | 28 | 8 | - | 7 | - | 13 | 38 | 49 | -11 | 31 |
| 12 Vejle | 28 | 7 | - | 6 | - | 15 | 41 | 57 | -16 | 27 |
| 13 B 93 | 28 | 6 | - | 7 | - | 15 | 41 | 47 | -6 | 25 |
| 14 Brønshøj | 28 | 6 | - | 6 | - | 16 | 39 | 70 | -31 | 24 |
| 15 FC Aarhus | 28 | 5 | - | 4 | - | 19 | 27 | 78 | -51 | 19 |
| 16 B 1913 | 28 | 2 | - | 7 | - | 19 | 22 | 70 | -48 | 13 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen,(Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

## Danska 2. deild

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HIK | 28 | 16 | - | 7 | - | 5 | 62 | 40 | 22 | 55 |
| 2 Dalum | 28 | 16 | - | 5 | - | 7 | 65 | 40 | 25 | 53 |
| 3 Næstved | 28 | 14 | - | 8 | - | 6 | 58 | 31 | 27 | 50 |
| 4 Holbæk | 28 | 13 | - | 8 | - | 7 | 59 | 41 | 18 | 47 |
| 5 Kolding FC | 28 | 13 | - | 7 | - | 8 | 50 | 40 | 10 | 46 |
| 6 B1909 | 28 | 12 | - | 5 | - | 11 | 54 | 46 | 8 | 41 |
| 7 Brabrand | 28 | 10 | - | 8 | - | 10 | 49 | 43 | 6 | 38 |
| 8 Slagelse | 28 | 10 | - | 7 | - | 11 | 49 | 43 | 6 | 37 |
| 9 Glostrup | 28 | 11 | - | 4 | - | 13 | 51 | 54 | -3 | 37 |
| 10 Hjørring | 28 | 11 | - | 3 | - | 14 | 43 | 71 | -28 | 36 |
| 11 Lyngby | 28 | 8 | - | 9 | - | 11 | 47 | 60 | -13 | 33 |
| 12 Jetsmark | 28 | 8 | - | 9 | - | 11 | 36 | 56 | -20 | 33 |
| 13 Kalundborg | 28 | 7 | - | 9 | - | 12 | 53 | 61 | -8 | 30 |
| 14 Holstebro | 28 | 8 | - | 6 | - | 14 | 45 | 57 | -12 | 30 |
| 15 Skive | 28 | 8 | - | 4 | - | 16 | 47 | 56 | -9 | 28 |
| 16 Hvidovre | 28 | 5 | - | 9 | - | 14 | 30 | 59 | -29 | 24 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

## Íslendska Landsbankadeildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fylkir | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 6 | 1 | 5 | 10 |
| 2 ÍA | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 6 | 5 | 1 | 8 |
| 3 Keflavík | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 6 | 5 | 1 | 7 |
| 4 ÍBV | 4 | 1 | - | 3 | - | 0 | 5 | 4 | 1 | 6 |
| 5 FH | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 3 | 3 | 0 | 5 |
| 6 Grindavík | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 4 | 5 | -1 | 5 |
| 7 Fram | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 6 | 6 | 0 | 4 |
| 8 KR | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 5 | 7 | -2 | 4 |
| 9 KA | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 3 | 5 | -2 | 3 |
| 10 Víkingur R | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 2 | 7 | -5 | 1 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)



Kom og steðga vónloysinum

Vit kunnu øll ávirka teir myndugleikar, ið hava ábyrgdina av, at fólk verða fongslað av órøttum, pínd ella avrættað. Tú kanst gera tað við at fara inn á heimasíðuna hjá Amnesty International í Føroyum og tekna teg til at Skriva fyri lívi. Teknar tú teg til átakið, fært tú trý brøv um mánaðin, sum tú kanst senda teimum, ið hava ábyrgdina av, at mannarættindi verða brotin.

Tess fleiri, ið gera vart við órættvísi kring heimin, tess betur ber til at ávirka tey, ið hava ábyrgdina. Kom og ver við at fría samvitskufangar, forða avrættingum og steðga píning. Kom og Skriva fyri lívi.

amnesty international
www.amnesty.fo

Sosialurin
Sosialurin
i

VARPIÐ
Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2